## ame.fo andlitið hjá Atlantic Music Event

Í gjár varð nýggja heimasíðan hjá Atlantic Music Event løgd út, á henni eru nógv spennandi tíðindi, ið hava samband við tiltøkini, ið verða í Føroyum, Íslandi, Bretlandi og Dan. Eitt nú ber til at lesa um støðuna í sangskrivarakappingini, umframt at fleiri av nøvnunum á AME-Føroyar verða kunngjørd. Síðan verður bindiliðurin millum fyriskipanarbólkin og almenningin. Hon fer alsamt at vaksa í vavi, sum tíðin fráliður.

Síðan er ment í samstarvi við Stephansonshús og liggur á ame.fo. Samstundis er gjørdur ein sokallaður myspace profilur ið nevnist myspace.com/atlanticmusicevent




## Ampop á AME

Millum bólkarnar á AME-Føroyar er íslendski elektroniski bólkurin Ampop. Bólkurin gav í november 4. fløguna "Sail to the Moon" út, ein fløga, ið av lurtarum á størstu íslendsku útvarpsstøðini Rás 2 varð vald til ársins fløgu, eins og hon er í uppskoti til fleiri heiðurslønir á íslendsku tónleikaheiðurslønunum.Næst seinasta fløgan "My Delusions" seldi til gullfløgu í Íslandi og tittullagið varð valt til ársins lag og ársins sjónbandalag á íslendsku tónleikaheiðurslønunum í fjør.

Vitja Ampop á myspace:
*www.myspace.com/ampopband*

# Við paparazzi í hølunum



**Tær tríggjar Carlsen systrarnar Vanja, Laila og Barbara eru vorðnar kend andlit í Miðamerikanska landinum Puerto Rico. Tær skulu syngja til vígsluna, tá tvey av kendastu fólkunum í Puerto Rico verða gift leygardagin. Fyri føroysku songkvinnurnar merkir hetta eitt lív við paparazzi myndamonnum og stórum fjølmiðla áhuga.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tær tríggjar Carlsen systrarnar Vanja, Laila og Barbara eru hesar vikurna vorðnar kend andlit í Puerto Rico, og litaði parturin av tíðindaheiminum í Miðamerikanska landinum, hevur lært 2 nýggj orð Faroe Islands.

Teirra ferð móti stjørnunum byrjaði, tá vinmaður teirra pianisturin, tónasmiðurin og Puerto Rico maðurin Adlan Cruz, beyð teimum at syngja í kirkjuni, tá hann og fotomodellin Melissa Rivera Carreras verða gift leygardagin.

Bæði Adlan og Melissa eru millum kendastu fólk í Puerto Rico, tí er brúðleypi ein hending, ið alt landið vendur eyguni ímóti.

- Hetta verður eitt ordiliga stórt brúðleyp, har øll tey kendu, guvernørurin og nógv onnur vera við, so tíðindabløð og aðrir miðlar eru ordiliga áhugaði í hesum. Her eru paparazzi myndamenn og onnur tíðindafólk, sum vilja vita alt um brúdleypið. Umboðsmaðurin hjá Adlas hevur biðið okkum um upplýsingar um Føroyar, og tað hava vit so givið honum, saman við linkum til onkrar heimasíðir, greiðir Vanja frá.

- Eingin kennur Føroyar í Puerto Rico, so tí vilja tey gjarna vita okkurt um hetta landið, sum vit eru úr, sigur Vanja.

Carlssen systrarnar virka á henda hátt sum umboð fyri Føroyar.

Vígslan verður send beinleiðis á internetinum á heimasíðuni, ið parið hevur fingið sær adlanandmelissa.com. Vígslan verður leygardagin kl. 16 lokala Puerto Rico tíð. Hetta er 4 tímar aftanfyri okkara klokkutíð, so um onkur føroyingur hevur hug til at fylgja við á alnetinum, so verður hetta kl. 12 føroyska tíð.

Systrarnar ferðast í løtuni kring Amerika við The Revival Ministry, í hesum døgum eru tey í Puerto Rico. Har tær síðan týskvøldið hava sungið til møtir hjá prestinum Rodney Howard Brown. Møtini hava verið í einum sali, ið tekur umleið 3000 fólk. Møtini vera somuleiðis send um allan heim á kristnu sjónvarpsrásini CTN.

-Stjórin á CTN, Bob Deander er ofta á møti hjá The Revival Ministry, greiður Vanja frá í telefonini úr Puerto Rico.



*Vanja, Laila og Barbara saman við kenda pianistinum og tónasmiðinum Adlan Cruz*



## Scorpions í Televarpinum

**Leygarkvøldið og sunnukvøldið ber til at síggja ein spildurnýggja sending um Scorpions og Summar Festivalin á Rás 1 hjá Televarpinum.**

**TÍÐINDASKRIV**

Sendingin snýr seg um rockbólkin Scorpions og tær fyrireikingar, sum verða gjørdar til vitjanina hjá hjá teimum á Summar Festivalinum. Tosað verður við fyriskiparar og onnur, sjónbandalag hjá Scorpions verða víst, og fólk kunnu eisini síggja framúrskarandi rockbólkin á palli.

Seinast í sendingini kunnger Summar Festivalurin ein spennandi bólk, sum skal spæla á festivalinum í ár.

Sendingin um Summar Festivalin kann síggjast á Rás 1 hjá Televarpinum leygarkvøldið 10. mars kl. 20.00 og 22.00 og sunnukvøldið 11. mars kl. 22.00.